Ár teirra brekaðu:

# Evnisvika í skúlunum

**Hesa vikuna hava 34 skúlar kring landið arbeitt við í eini evnisviku í sambandi við, at tað er ár teirra brekaðu. 5. flokkur í Santa Frans skúlanum í Havn hevur arbeitt við evninum, og týsdagin vóru tey á vitjan á Virkni, har tey tosaðu við brúkarar um hetta at bera brek**

*Sonni Djurhuus letur væl at hesum tiltakinum men heldur, at tað kundi verið betur, um ikki allir skúlarnir vóru í gongd í senn, tí tað hevur víst seg at verið nakað torført at sleppa inn á stovnarnar, tí tað eru so mong, sum arbeiða við evninum*

EVNISVIKA
*Myndir: Jens K. Vang*
*Tekstur: Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



Tað er MBF, sum hevur tikið stig til hesa evnisvikuna og heitt á skúlarnar um at arbeiða við hesum evninum. Undirtøkan er góð, og 34 skúlar hava arbeitt hesa vikuna við evninum. Millum aðrar 5. flokkur í Santa Frans skúlanum í Havn.

Flokslærari hjá fimta flokkinum er Sonni Djurhuus, og hann sigur, hann setti sær sum mál, at børnini skuldu arbeiða við tí, sum er nærliggjandi teimum sjálvum. Tað vil siga, at hann setti út í kortið, at tey skuldu finna útav, hvussu tað er at vera menningartarnaður, og hvussu hesi sjálvi uppliva tað at vera menningartarnaður.

– At arbeiða við evninum tey brekaðu má sigast at vera eitt sera breitt evni, og tí haldi eg, at tað var betur at fara inn á eitt ávíst øki at arbeiða, sigur Sonni. Og hansara flokkur hevur sostatt arbeitt við menningartarnaðum.



*Næmingarnir í 5. flokki valdu sjálvi hetta evnið fram um at arbeiða við einum øðrum evni*

## Vitjaðu Virkni

Næmingarnir hava sæð filmar, fingið frágreiðingar og so framvegis. Men tað týdningarmiklasta er helst teirra egni partur í tí aktiva arbeiðinum. Tí tað er ongin loyna, at ein lærir mest, tá ein er í gongd við eitthvørt. Tí settu tey seg í samband við Virkni, har tey so vitjaðu týsdagin og tosaðu við tvey av brúkarunum um júst hetta at vera menningartarnaður.

Sonni sigur, at tað gekk væl, og hann heldur so avgjørt, at børnini fingu nógv burturúr hesi vitjan.

– Tey sóu tey menningartarnaðu við heilt øðrum brillum aftaná. Og eg haldi, at tey gjørdust bilsin av at síggja, hvussu tey menningartarnaðu virka gjøgnum dagin, sigur Sonni.

Eisini heldur Sonni so avgjørt, at næmingarnir sjálvir fegnir vildu arbeiða við hesum evninum, tí tá áheitanin frá MBF kom, gav hann sínum flokki tvey í at velja. Hann segði, at hann hevði valt sær tvey evni, sum tey kundu arbeiða við í eina viku. Antin hesa evnisvikuna ella eina um heystið.

– Og næmingarnir vóru ikki í iva. Tey vildu nógv heldur arbeiða við hesum evninum, sigur Sonni.

## Ringt at sleppa inn

Sonni Djurhuus heldur, at hetta tiltakið er eitt avbera gott hugskot, tí tað er við til at varpa ljós á tey brekaðu. Og tað kann verða við til at geva børnum eina heilt aðra uppfatan av teimum, ið bera brek. Men hann sigur tó, at tað hevði kanska verið eitt betri hugskot, at ikki allir 34 skúlarnir arbeiða við hesum evninum í somu viku. Tí hann sigur, at tað hevur verið avbera torført hjá teimum at sleppa inn á ymsu stovnarnar. Og tá tey so eru sloppin, so hevur vitjanin verið nógv stytri enn ynskiligt var.

– Hetta er eitt fínt tiltak, sum óivað verður við til at børn kunnu fáa eyga upp fyri, at hesi eisini hava eitt lív, og hvussu tey liva tað, sigur Sonni Djurhuus.

Evnisvikan í Santa Frans endar við, at næmingar hava munnliga framløgu fyri floksfeløgunum, um hvat tey hava fingið burtur úr hesa vikuna.

Og so verður hon alment endað fyri allar luttakandi skúlar við einum stórum barnatiltaki í høllini á Hálsi fríggjadagin, har sjónleikur, M´s Blues Band og ítróttarspøl millum annað verða á skránni.



– *Evnisvikan hevur fingið børnini at síggja tey menningartarnaðu við heilt øðrum eygum, sigur Sonni Djurhuus, lærari hjá 5. flokki í Santa Frans skúlanum*



*MBF hevur tikið stig til hesa evnisvikuna í sambandi við, at tað er ár teirra brekaðu, men so er tað upp til hvønn einstaka skúlan, hvussu arbeitt verður við evninum í teimum ymsu flokkunum*

ítróttur

Nr. 192 • fríggjadagur • 10. oktober 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Hans Kristian basti stórmeistara

**Hans Kristian Simonsen vann ein góðan skølt í Skálanum í Klaksvík mikudagin**

TALV
*www.faroechess.com*




*Hans Kristian Simonsen vann móti skotska stórmeistaranum, Colin McNabb*
*Mynd: www.faroechess.com*

Í hvøssum vindi og regni, fór annað umfar í gongd í mikumorgunin klokkan 10 í talvkappingini, 2nd International Kjølbro Heilsøla International. Tíbetur varð ikki talan um útitalv hesuferð, men hinvegin um flógvu karmarnar uppi í Skálanum.

Og har høvdu føroyingarnar ovmikið at frøðast um. Hans Kristian Simonsen vann sannførandi á skotska stórmeistaranum Collin Mcnabb við hvíta fólkinum. Hetta er triðju ferð at Hans Kristian hevur lagt ein stórmeistara niður. Hann er nú við í kappingini aftur, eftir tapið í gjár móti IM Eriksson.

Eisini Flóvin Tór Næs fekk eitt frálíkt úrslit. Hann basti danska altjóða meistaranum Klaus Berg í einum kontantum álopi. Flóvin breyt verjugarðarnar hjá Berg niður og danin mátti at enda geva ein mann fyri ikki at verða mátaður. Tað er ikki ofta, at føroyskir telvarar hølva altjóða meistarar av í einum so ósmædnum álopstalvi, so Flóvin er eisini komin væl við aftur eftir tapið í gjár móti Heina Olsen. Heini hinvegin, megnaði ikki at halda á við somu góðu taktunum í morgum. Hann tapti móti Kim Pilgaard, sum er ósigraður í Føroyum nú í trimum talvkappingum. Møguliga átti Heini at hildið talvið javnt, men í tíðneyðuni traðkaði hann við síðuna av og tað verður hart revsað av einum altjóða meistara í Pilgaard klassanum.

Føroyameistarin Martin Poulsen tapti annað talvið á rað, hesuferð móti svenskaranum Johan Eriksson, sum er sera sannførandi at síggja til. Eriksson er altjóða meistari, men hevur sítt borgarliga yrki á einum svenskum kjarnorkuverki. Hann kann við hetta lag gerast eitt gott boð uppá ein vinnara av allari kappingini.

Hjá unglingunum liggur Rani Baldursson framvegis á odda við 2 1/2 stigi, men heilir tríggir telvarar eru eittans eitt hálvt stig aftanfyri, og teir eru Rógvi Mortensen, Helgi Dam Ziska og Sjúrður Thorteinsson.

## Støðan eftir triðja umfar

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | IM Johan Erikson | Svøríki | 2114 | 2,0 |
| 1 | FM Heini Olsen | Føroyar | 2264 | 2,0 |
| 1 | IM Sævar Bjarnason | Ísland | 2284 | 2,0 |
| 1 | IM Kim Pilgaard | Danmark | 2459 | 2,0 |
| 5 | GM Colin McNabb | Skotland | 2379 | 1,5 |
| 5 | IM Klaus Berg | Danmark | 2434 | 1,5 |
| 7 | Hans Kristian Simonsen | Føroyar | 2240 | 1,0 |
| 7 | Martin Poulsen | Føroyar | 2252 | 1,0 |
| 7 | Ólavur Simonsen | Føroyar | 2261 | 1,0 |
| 7 | FM Flóvin Þór Næs | Føroyar | 2337 | 1,0 |

**Starvsfólk**
til Bónus í Havn

Søkt verður eftir einum starvsfólki til at sita við kassan.

Arbeiðstíðin er uml. 30 tímar um vikuna.

Løn smb. sáttmála við S&K.

Umsóknarfreistin er 17. oktober 2003.

Skrivlig umsókn skal sendast til:
Bónus, Óðinshædd, 100 Tórshavn,
att.: Janus S. Rasmussen.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Janus á telefon 31 52 63.

BÓNUS